## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sól. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útsynningi og seinnapartin regn. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinni lækkar hann niður í útsynningi. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 2 og 6 stig.

# Talgildingin størsta avbjóðingin

**– Størsta avbjóðingin verður at halda skil á nýggja informationsstreyminum, sum er byrjaður við talgildingini, sigur nýggi landsskjalavørðurin, Sámal T. F. Johansen**

STARV
*Heri á Rógvi*



Eftir at hava verið í stjóraloysi síðani 1. mars 2001, fekk Landsskjalasavnið á nýggjárinum nýggja stjóra og Landsskjalavørð.

Hesin er tann 37 ára gamli Sámal Tróndur Finnsson Johansen. Sámal Tróndur hevur lisið søgu og geografi á Roskilde Universitets Center.

Hann varð liðugur við lesnaðin í 1996, og hann hevur síðani tá starvast sum granskingarhjálpari á RUC, hevur gjørt kanningar í USA í sambandi við Svørtubók, arbeitt sum savnsvørður og hann hevur og arbeiðir framvegis við sínari Ph.D. verkætlan um Føroyar undir Kalda krígnum.

### Sjónligt

Nýggi landsskjalavørðurin ætlar at gera Landsskjalasavnið meira sjónligt.

– Ov fá kenna til stovnin, og hetta ætla vit at gera nakað við. Stovnurin skal vera meira kendur og sjónligari. Vit vilja koma meira út og útgeva tilfar, sigur Sámal T. F. Johansen.

Landsskjalasavnið hevur nógvar uppgávur at røkja. Sámal Tróndur nevnir m.a., at teir hava eina stóra uppgávan at vegleiða almennum stovnum, og har kundi nýggja landsskjalavørðurin væl hugsað sær, at teir fingu ein sterkari leiklut sum ovasti myndugleiki, ið teir hava sambært galdandi lóg.

Harumframt vil nýggi landsskjalavørðurin hava savnið at luttaka meira aktivt í granskingarverkætlan. Bæði egnar og í samstarvi við onnur, tí á savninum liggja eitt ótal av upplýsingum, ið er avgerandi í flest øllum granskingarverkætlanum í Føroyum.

Landsskjalasavnið hevur seks fólk í starvi, og játtanin er uml. 2,6 mió. Tá seks fólk skulu lønast er ikki nógv eftir.

Somuleiðis hevur Landsskjalasavnið hølistrupulleikar.

– Vit hava mett, at tørvur er á 15 km. av hillaplássi, men vit hava bert 4 km. tøkar, og hetta ger, at vit taka ikki meira tilfar inn sum er, sigur Sámal T. F. Johansen.

Enn er bert ein dreymur um ein nýggjan bygning til, men greitt er, at tørvur er á betri hølisviðurskiftum.

Men kanska tann størsti avbjóðingin býr í nýggju tøknini.

– Størsta avbjóðingin verður at halda skil á nýggja informationsstreyminum, sum er byrjaður við talgildingini. Nýggja tøknin merkir avbjóðingar fyri okkum, tá vit skulu velja format og standardir, sum skulu virka nógv ár fram í tíðina, og innan tøknin broytist støðan allatíðina, sigur landsskjalavørðurin.

Fyri Sámal Trónd er nýggja starvið ógvuliga spennandi.

– Fyri ein søgufrøðing í heila tikið er tað ein dreymur at sleppa at arbeiða á einum savni. Her fært tú innlit í allar loynidómarnar.

At vera landsskjalavørður merkir eisini, at tú sleppur at opna, sigur Sámal T. F. Johansen.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | ÷4 |
| Halifax | ÷3 |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 1 |
| London | 3 |
| Tromsø | ÷7 |
| Bergen | ÷6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | ÷17 |
| Keypmannah. | ÷7 |
| Helsinki | ÷19 |
| Moskva | ÷24 |
| Berlin | ÷4 |
| Warzawa | ÷9 |
| Kiev | ÷10 |
| Bukarest | ÷3 |
| Paris | ÷1 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 16 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 8 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 0 |
| Miami | 17 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 29 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1027 hPa yvir Skotlandi verður yvir Føroyum mikudagin. men fer síðani í ein útsynning.




Hátrýstið yvir Føroyum fer í ein útsynning og lágtrýstið vestan fyri Írland fer í landsynning og grynnist.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/01 kl. 06[00]– 07/01 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 2,1°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 06/01 kl. 06[00]– 07/01 kl. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 2,5 mm




### TIPS 12 úrslit
**Vika 1 – 5. januar**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Fulham–Birmingham | 1 |
| 2. | Manchester C.–Liverpool | 2 |
| 3. | Wolverhampton–Newcastle | 1 |
| 4. | Ascoli–Vicenza | 2 |
| 5. | Genoa–Ternana | 1 |
| 6. | Lecce–Catania | 1 |
| 7. | Livorno–Cagliari | 1 |
| 8. | Messina–Salernitana | 1 |
| 9. | Napoli–Ancona | X |
| 10. | Triestina–Siena | 1 |
| 11. | Venezia–Bari | X |
| 12. | Verona–Cosenza | 1 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 12 rætt: | 10.547,- kr. |
| 11 rætt: | 680,- kr. |
| 10 rætt: | 66,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

30. des.: Mánin næstur jørðini
2. jan.: Tendring
4. jan.: Jørðin næst sólini
10. jan.: Fyrra kvarter
11. jan.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. jan | 10.55 | 23.16 | 09.55 | 22.16 | 10.10 | 22.31 | 00.34 | 12.55 | 01.34 | 13.55 | 09.10 | 21.31 | 08.10 | 20.31 | 11.10 | 23.31 | — | 12.10 | 10.40 | 23.01 | 11.55 | — |
| 9. jan | 11.35 | 23.54 | 10.35 | 22.54 | 10.50 | 23.09 | 01.16 | 13.35 | 02.16 | 14.35 | 09.50 | 22.09 | 08.50 | 21.09 | 11.50 | — | 00.31 | 12.50 | 11.20 | 23.39 | 00.16 | 12.35 |
| 10. jan | — | 12.26 | 11.26 | 23.58 | 11.41 | — | 01.54 | 14.26 | 02.54 | 15.26 | 10.41 | 23.13 | 09.41 | 22.13 | 00.09 | 12.41 | 01.09 | 13.41 | — | 12.11 | 00.54 | 13.26 |
| 11. jan | 00.58 | 13.31 | — | 12.31 | 00.13 | 12.46 | 02.58 | 15.31 | 03.58 | 16.31 | 11.46 | — | 10.46 | 23.20 | 01.13 | 13.46 | 02.13 | 14.46 | 00.43 | 13.16 | 01.58 | 14.31 |

5 707265 100036 >